## Árni Dam, russiskur konsul:

# »Fyrr kastaðu vit rotin – nú góðtaka vit russar

**Vit hava sett skiparanum á russiska skipinum, Adminiral Starikov, stevnu fyri at vita, hvat teir takast við, og hvussu teir trívast her um okkara leiðir. Umborð á stóra, gráa og eitt sindur rustaða skipinum fáa vit heitar kanelbollar og sild í dós. – Russararnir hava tað gott, sigur Árni Dam, sum er russiskur konsul**



REPORTAGA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tá vit koma umborð á Admiral Starikov, sum russiska skipið verður kallað, taka Árni Dam, sum er russiskur konsul, og skiparin, Konstantin Shulpin, blídliga ímóti okkum.

Vit verða boðin niðan í kamarið hjá skiparanum, og á borðinum standa smákøkur og mjólk úr Russlandi. Vit seta okkum inn á bonkin, og Konstantin setur seg við skrivaraborðið. Skiparin sigur ikki tað stóra, tí hann dugir ikki so væl at málbera seg á enskum, men hann er blíður og í góðum hýri. Árni og hann práta saman á russiskum, og síðan greiðir Árni okkum frá, hvat skiparin sigur.

– Hetta reiðaríið eigur 89 skip og er eitt tað frægasta, sum kemur til Føroya. Teir hava fiskað sild beint uttan fyri føroyska markið og hava fingið heili 2420 tons, sum manningin nú fer at umskipa til eitt annað skip. Manningin telur 83 mans og fimm kvinnur, sum arbeiða í kabússuni, sigur Árni.

Hann leggur afturat, at vanliga eru russisku skipini bert ein til tríggjar dagar í Føroyum í senn:

– Teir royna at lossa fiskin sum skjótast, bunkra, keypa mat og fara síðan avstað aftur. Tað kemur tó onkuntíð fyri, at manningin noyðist at fáa hjálp frá okkum.

### Geva skipsvistir

– Vit geva teimum nóg mikið av øllum, so teir klára seg. Í flestu førum fær manningin mat og klæðir, sum vit saman við øðrum sjálvbodnum, heilsølum og matvøruhandlum hava savnað inn, sigur Árni, meðan skiparin, Konstantin, býður okkum kola í blikkum:

– Gerið so væl. Um eina løtu fáa tit køkur, sigur hann á hálvbrotnum enskum. Árni heldur fram at greiða frá:

– Eg havi einaferð upplivað, at manningin umborð á einum skipi ikki fekk løn í tvey ár, tí reiðaríið var illa fyri fíggjarliga. Fyrr í ár hoyrdu vit um eitt russiskt skip, har manningin ongan mat hevði yvirhøvur og slapp ikki heim. Men tað er einasta ferðin í ár, at tað hevur staðið so illa til, og tíbetur er tað sjáldan, at russararnir í Føroyum veruliga hava brúk fyri hjálp frá okkum, greiðir Árni frá.

– Hóast manningin umborð ikki altíð er so illa fyri, fara vit sum oftast umborð við minst einum platti av mati, skoytir hann uppí.

Skiparin nikkar og sigur, at manningin fegnast um blíðskapin frá føroyingunum, hóast starvsfólkini umborð sum oftast bert eru heimanífrá fýra mánaðir í senn:

– Flest øll fáa bert 4000 krónur í løn um mánaðin, og tá eru tey væl lønt, um hugsað



*– Russararnir hava tað gott, sigur Árni Dam, russiskur konsul*





*Russararnir vóru forvitnisligir og fryntligir. Vit fingu rómakøkur og kola í blikki til drekkamunn*



*Umborð á Admiral Starikov hevur manningin møguleika at nýta hitarúm*